


www.oljan.fo

**Jan Müller** 29 - 10 - 2012

# Fyrilestur um smátjóðir í Arktis

Føroya landsstýri hevur sett sær sum mál at gera eina ætlan fyri, hvussu Føroyar best gagnnýta fyrimunirnar av broytingunum, sum henda í arktiska økinum, og hvussu vit verja okkum móti árinunum, sum standast av nýggjum farleiðum í økinum. Uttanríkistænastan bjóðar í hesum sambandi til fyrilestur við Alyson J. K. Bailes týsdagin 30. oktober kl. 10 12 á Løgmansskrivstovuni. Alyson J. K. Bailes fer at røða um avbjóðingar og møguleikar hjá smátjóðum í arktiskum høpi. Hon kemur somuleiðis inn á týdningin av millumlanda samstarvi og felagsskapum, til dømis Arktiska ráðnum og Norðurlendska Ráðharraráðnum. Alyson J.K. Bailes er gestaprofessari á Háskúla Íslands og undirvísir í trygdarpolitikki. Hon hevur drúgvar royndir innan akademiska heimin og somuleiðis bretsku uttanríkistænastuna, har hon hevur arbeitt við vápnaeftirliti, trygdarpolitikki og verjumálum. Í 1987 til 1990 var hon sendikvinna í Beijing, har hon var virkin í samráðingunum viðvíkjandi Hong Kong. Í 1994 til 1996 var hon stjóri á deildini fyri trygdarpolitikki í bretsku uttanríkistænastuni og frá 1997 til 2000 var hon politiskur stjóri í Western European Union, ein evropeiskur trygdarstovnur í Brússel. Aftaná hetta var hon sendikvinna í Finnlandi, til hon í 2002 tók við sum stjóri á Stockholm International Peace Research Institute (SIPRI), har hon var til í 2007. Tiltakið er alment, men tilmelding er neyðug vegna avmarkað pláss. Til ber at boða frá luttøku umvegis teldupost sue@tinganes.fo ella við at ringja á 306025 skrivar heimasíðan hjá løgmansskrivstovuni í morgun.